FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. januar 2026
Mál.: 26/00452
Viðgjørt AE
Tygara skriv: 52-062/2025

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-062/2025 frá Henrik Old, løgtingsmanni, settur landsstýriskvinnuni í fíggjarmálum, Ruth Vang, um boriútgerðina til Tjørnuvíkartunnilin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hví er boriútgerðin til Tjørnuvíkartunnilin ikki flutt norður enn – og hvar stendur hon nú?
2. Nær kann væntast, at boriútgerðin verður flutt?
3. Nær verður fyrsta skotið latið av til Tjørnuvíkartunnilin?

Svar til spurning 1 og 2
Tunnilsliðið hjá Landsverki varð stovnað til at bora tunlar til smæstu støðini, og ætlanin hevur verið at halda áfram við Tjørnuvíkartunnilin, tá Dalstunnilin var liðugt boraður.

Tjørnuvíkartunnilin er liðugt fyrireikaður. Landsverk ætlar fyrst at bjóða arbeiðið út at gera økið kring tunnilsmunnarnar til privatar fyritøkur at gera, áðrenn tunnilsliðið hjá Landsverki kann byrja uppá sjálvan tunnilin.

Orsøkin til at útgerð, ið hoyrir til tunnilsgerð hjá tunnilstoyminum ikki er flutt norður enn er, at ein partur av útgerðini framvegis verður brúktur til at gera Dalstunnilin lidnan. Onnur útgerð stendur á maskinstøðini í Sundum og aðrastaðni, og nakað verður brúkt. Harumframt er byggiplássið ikki gjørt við Marmaskallará, har portalurin verður Haldórsvíkarmegin. Tunnilsborivognurin stendur vanliga í tjaldi, í hesum føri í Húsavík, tá hann ikki verður brúktur.

Útgerðin til tunnilsgerðina verður flutt norður til byggiplássið, tá byggiplássið við Marmaskallará norðanfyri Víkarnes er klárt.

Svar til spurning 3
Hetta er ein kostnaðarmikil íløga, og politisk støða má takast til, hvussu verkætlanin verður raðfest í langtíðarløguætlanini áðrenn farið verður í gongd við arbeiðið. Ein verklagslóg eigur at verða gjørd soleiðis, at løgtingið kann taka støðu til Tjørnuvíkartunnilin.

Landsverk hevur í oktobur 2025 mett, at Tjørvuvíkartunnilin kostar 200 mió. kr., um tunnilsliðið borar tunnilin. Metingin byggir á kostnaðin av Dalstunnlinum, sum tunnilsliðið boraði. Tað verður eisini neyðugt at breiðka ein part av vegnum frá Brúnni við Streymin og norður til tunnilin, sum verður mett til at kosta eini 50 mió. kr. Samanlagt 250 mió kr. í 2025 prísum. Harumframt er eitt váðaískoyti uppá 50 mió. kr.

Tøka játtanin til Tjørnuvíkartunnilin er 12 mió. kr. í ár, og sambært fíggjarlógini er játtanin 10 mió. kr. í 2027 og eisini 10 mió. kr. í 2028.

Arbeiðið við Tjørnuvíkartunlinum kann gerast so langt játtanin røkkur á hvørjum ári, men fyri at hava eina skilagóða arbeiðsgongd við tunnilsgerðini, metir Landsverk, at neyðugt verður við eini árligari játtan á millum 30 mió kr. til 40 mió. kr.

Ruth Vang
Landsstýriskvinna